

*Teir báðir - eru Jóan Petur Olsen (vm.) og Hildibjartur Joensen, báðir úr Norðragøtu - eru í ferð við at tekja hesi húsini í Syðrugøtu. Teir skulu verða lidnir við sítt arbeiði um eina viku*

# – Krevur turrveður at pappa

**JPO-Bygging hevur úr at gera, og eru beint nú í ferð við at byggja eini sethús ovarlaga í Syðrugøtu. Arbeiðið gongur væl, og skal verða liðugt um eina viku**

HÚSASMÍÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður*

**Syðrugøta:** Hamarsløgini duna hørð og tøtt í einum nýggjum sethúsum ovarlaga í Syðrugøtu.

Uttanfyri húsini standa tveir bilar við amboðum í, og við annan teirra liggur ein svartur hundur og durvar.

Av takinum hoyrast hesi taktføstu hamarsløgini, og aftanfyri nakrar plátur síggjast tveir mans smíða av øllum alvi.

Hesir báðir eru Jóan Petur Olsen og Hildibjartur Joensen, báðir úr Norðragøtu, sum beint nú eru í ferð við at tekja hesi húsini.

Teir síggja tvey umboð fyri tíðindatænastuna koma, men teir hava sítt arbeiði at útføra. Teir smíða framvegis.

Vit rópa teir niður av takinum, og løtu seinni eru teir niðurkomnir, og prátið kann byrja.

– Vit hava úr at gera beint nú. Vit skulu verða lidnir við húsini áðrenn hesin mánaðurin er úti, sigur Jóan Petur, sum er maðurin aftanfyri JPO-Bygging í Norðragøtu.

## Saman og hvør sær

JPO-Bygging hevur 4 ár á baki. Frammanundan hevði Jóan Petur lært til snikkara á einum virki á Kambsdali, og hevur eisini arbeitt á einum snikkaravirki á Rituvíkshálsi

Hetta er ein fyritøka, ið spennir rættiliga víða – frá stórum arbeiðum til tey smærru arbeiðini.

Nú, teir báðir Jóan Petur og Hildibjartur eru í ferð við at smíða hesi húsini í Syðrugøtu, er talan um fyrstu sethúsini, sum teir sjálvir hava gjørt.

- Men vit hava tó gjørt fleiri aðrar bygningar, men tá hava vit altíð verið saman við øðrum, sigur Jóan Petur.

Teir hava m.a. verið við til at bygt eina høll á Hellunum, Sambýlið í Norðragøtu og ein størri handilsbygning úti í Runavík.

## Sethús í gerð

Eitt slíkt virksemi innan byggivinnuna er altíð merkt av, hvussu nógv arbeiði tað eydnast teimum at útvega.

Hetta ávirkar sjálvandi eisini talið av arbeiðsfólkum. Teir eru í løtuni seks mans til arbeiðis, har tveir teirra vóru í ferð við at tekja hesi sethúsini í Syðrugøtu, meðan hinir vóru í øðrum uppgávum.

Tveir aðrir mans arbeiddu við at gera eini onnur sethús í grannalagnum hjá hesum fyrra húsinum, meðan hinir báðir arbeiddu við somu uppgávu í einum sethúsum í Fuglafirði.

## Halda tíðarfreistina

Omanfyri bygdina í Syðrugøtu hevur kommunan framt eina útstykking, har fleiri sethús longu eru bygd.

Longur uppi eru onnur øki útstykkjað, og fólk eru farin til arbeiðis við at byggja sethúsini.

Við hetta sethúsið, har Jóan Petur og Hildibjartur nú arbeiða, byrjaðu teir arbeiðið um 1. mars, og skulu verða lidnir við sín part, tá hesin mánaðurin er úti.

– Vit hava ikki so nógv eftir, so tað fer nokk at ganga, sigur Jóan Petur.

Eftir at hetta arbeiðið er lokið, skulu teir í holt við ymisk smærri arbeiði: Teir skulu gera ein dur í einum húsum, og skulu eisini klæða eini onnur hús. Og so eru onkur onnur arbeiði, sum liggja og bíða eftir góðum handverkarum.

– So vit hava nokk at gera. Tað bilar einki við tí, sigur Jóan Petur.

Soleiðis sum tað sær út í løtuni, so hava teir arbeiðið hetta árið út. Og vanliga koma eisini nýggj arbeiðir inn alla tíðina.

## Tróðrið á

Hesi sethúsini í Syðrugøtu standa ovarlaga í bygdini í ovaru síðu av vegnum.

Teir hava, síðani teir byrjaðu arbeiðið fyri tveimum mánaðum síðani, reist húsini og eru nú í ferð við at tróðra – t.v.s. leggja tróðrið á.

Eftir tað, skulu teir sveisa papp oman á aftur. Spurningurin er so, nær tað verður.

– Vit ætla at gera tað so skjótt sum gjørligt. Men tað krevst gott veður til tað.

– Tað krevur turrveður, so tað bíða vit eftir, sigur Jóan Petur.

Fríggjadagin var so ikki nakar hugsingur um at pappa, tí tað var bæði kalt, vátt og væl at vindi.

Vónandi eydnast tað hesa vikuna.



*– Vit hava gjørt fleiri bygningar, men tá hava vit altíð verið saman við øðrum, sigur Jóan Petur*